# Einki avloysaraskip hesaferð

**Samgongan tordi ikki at taka atkvøðugreiðslu um avloysaraskip, sigur uppskotsstillarin, sum væntar, at um atkvøtt varð í gjár, varð skip til Leirvíksfjarðaleiðina keypt**

EYKAJÁTTAN
*Edvard Joensen*

Norðoyingar vóru ikki so øgiliga langt frá einum strandfaraskipið afturat at sigla um Leivíksfjørð, tá broytingaruppskot var fyri í tinginum í gjár.

Í samband við eykajáttanarlóg fyri september 2001 høvdu Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin skotið upp, at eittt avloysaraskip verður keypt til Strandferðsluna. Víst varð á, at eitt slíkt skip kann fáast fyri undir 25 milliónir krónur. Hetta sæst í notati frá landsstýrismaninum við vinnumálum, sigur Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður, og uppskotsstillari.

Hann sigur at sum tingsalurin var mannaður í gjár, hevði uppskotið um at keypa skip ivaleyst verið samtykt, um atkvøtt varð um tað. Men atkvøðugreiðslan kom ongantíð, tí samgongan fekk kaldar føtur og kreyp undan, sigur hann

Heini O Heinesen, tingmaður Tjóðveldisfloksins í Noyðoyum setti undir viðgerðini fram uppskot um at koyra málið aftur í Fíggjarnevndina, og tað uppskotið fekk 21 atkvøður. Sostatt var eingin atkvøðurgreiðsla um uppskotið um at keypa skip nú. Samgongan tordi rætt og slætt ikki, sigur vilhelm Johannesen.

Tá málið var til viðgerðar í tinginum í gjár, var rættiliga nógv, sum bendi á, at tað kundi fara at verða samtykt, so skipið varð keypt. Millum annað vóru ábendingar um, at Rúna Sivertsen, sum umboðar Fólkaflokkin í Norðoyum fór at atkvøða fyri tí, um atkvøtt varð serstakt um skipakeypið uttan um restina av eykajáttanarlógini. Og tað fór tað at verða, varð sagt.



*Næstu ferð Dúgvan skal í dokk ella fær eitthvørt brek, verður helst neyðugt at fara út aftur at leiga skip sum Scaniu, ið sigldi um Leirvíksfjørð, seinast Dúgvan hevði maskinskaða*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Jógvan burtur

Hinvegin gjørdi eitt nú Heini O. Heinesen, løgtingmaður Tjóðveldisfloksins í Norðoyum, nógv burturúr, at hin fólkafloksmaðurin í Klaksvík, Jógvan við Keldu, ikki var á fundi.

Fleiri tingmenn róðu fram undir, at Jógvan við Keldu tordi ikki at møta á fundi, men lá heima undir páskoti av at vera upptikin aðrastaðni, so hann slapp undan at atkvøða í móti samgonguni. Tí fáur hevur meira enn hann brúkt talutíð í tinginum í samband við meira ferðslu um Leirvíksfjørð.

Samgongumenn vóru harðliga í móti uppskotinum. Karsten Hansen, landsstýrismaður tosaði um ábyrgdarloysi, um uppskotið varð samtykt, meðan Jógvan Durhuus, úr Tjóðveldisflokkinum, ikki dugdi at skilja, at ferðslan um Leirvíksfjørð nú knappliga var vorðin nakar trupulleiki. Hesin trupulleikin var fleiri ára gamal, helt hann.

Til tað sigur Vilhelm Johannesen, at tann ovurstóri trupulleikin, sum í dag er um Leirvíksfjørð, er íkomin, síðan Eimskip í ár gavst at sigla til Klaksvíkar eftir farmi. Nú skal alt á hjólum um fjørðin, og harvið kemur proppur í.

### Seinkar tunlinum

Heini O. Heinesen var í móti uppskotinum við teirri grundgeving, at hann metti, at kom eitt skip nú, fór tað bara at seinka undirsjóvartunlinum. Hann metti, at tær 25 milliónirnar, skipið væntandi fer at kosta, fóru at verða tiknar av eini almennari íløgu í tunnilin.

Ta grundgevingina skilir Vilhelm Johannesen ikki, tí undirsjóvartunnil kemur so eingin undir Leirvíksfirði fyrr enn í fyrsta lagi um fýra-fimm ár kortini. Og til ta tíð er rættiliga harðliga brúk fyri skipi, vísti hann á.

Eisini helt hann tað vera heilt óvanliga løgið, at landstýrismaðurin við vinnumálum, sum i áravís hevur gramt seg um, at einki avloysaraskip er til taks, nú beinleiðis mælir frá at samtykkja eitt ítøkiligt uppskot um at keypa eitt skip, sum kann fáast fyri ein rímiliga penga og væl saktans seljast aftur, tá undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi er liðugur, tí tá verður Ternan tøk.

Vilhelm Johannesen vísti á, at sami landsstýrismaður í notati hevur víst á, at eitt fimm til tíggju ára gamalt skip, sum er hóskandi í stødd. kann fáast fyri undir 25 milliónir.

Men Vilhelm Johannesen mátti bara ásanna, at samgongan tordi ikki at keypa norðoyingum eitt skip afturat, tá málið, eftir áheitan frá samgongumanni í Norðoyum, varð beint aftur í Fíggjarnevndina.

# Bygdaleiðir koyra brekað

**Bygdaleiðir skulu koyra arbeiðsfólkið til varda vekstaðin á Bakka í Vági, sigur Samál Petur í Grund, landsstýrismaður, í svari til Joannes Eidesgaard og Henrik Old, løgtingsmenn**

SERFLUTNINGUR
*Edvard Joensen*

Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum ætlar, at Bygdaleiðir skulu koyra arbeiðsfólkið til og frá Verkstaðnum á Bakka í Vági. Um ikki, so má onnur loysn finnast.

Suðuroyartingmenninir Hernik Old og Jóannes Eidesgaard úr Javnaðarflokkinum hava spurt landstýrismannin við almanna- og heilsumálum, hvørjar ætlanir hann hevur, nú busskoyringin hjá Verkstaðnum á Bakka í Vági vegna sparingar helt uppat tann 1. oktober.

Busskoyringin varð niðurløgd, tí pengar skuldu sparast hjá verkstaðnum, sum varð vorðið dýrari enn væntað at reka. Talan er um eina sparing upp á 100.000,- krónur, um busskoyringinin verður niðurløgd.

Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, svaraði í tinginum í gjár, at leiðslan í Heimarøktini og Serforsorgini hava kannað, hvørjir møguleikar eru at feðrast, og eru komin til, at við smærri broytingum i verandi skipan kunnu Bygdaleiðir koyra arbeiðsfólkið til og frá verkstaðnum.

Sámal Petur í Grund sigur, at royndir aðrastaðni vísa, at tað ber væl til at flyta fólkini til og frá við alemnnari ferðslu. Verkstaðið á Bakka var einasta verkstaðið av sínum slag, sum enn hevði egnan flutning. Øll hini hava brúkt almennu flutningsleiðirnar í fleiri ár, vísir hann á.

Hann sigur, at har, tað hevur verið neyðugt, hava boð verið send eftir serflutningsbussi við lyft og slíkum, sum Neyðugt er. Men tað metir hann ikki vera neyðugt í Suðuroyu beint nú, tí tann tænastan var heldur ikki í tí bussinum, sum nú gavst at koyra. Tað tulkar landsstýrismaðurin sum at tað er ikki brúk fyri eini slíkari lyft til tey fólkini, sum í dag ferðast til og frá verkstaðnum.



*Henrik Old og Jóannes Eidesgaard vilja hava pengar settar av á komandi fíggjarlóg til at reka bussflutningin til Verkstaðið á Bakka fyri*

Men hann ásannar, at tað onkunstaðni er trupult at koma til og frá steðgistøðunum, og at tann trupulleikin kann loysast við onkrum smávegis tillagingum.

Heitt er á Strandferðsluna vegna Bygdaleiðir um at gera hesar ábøtur, og verður nú bíðað eftir svari haðani, sum væntandi er um nakrar dagar, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í svarinum til suðuroyartingmenninar.

Annar teirra, sum setti spurniingin, Henrik Old, sigur, at hann er ikki heilt nøgdur við svarið.

Millum annað vísir hann á, at landsstýrismaðurin grundar svarið á, at hann ætlar at gera nakrar avtalur við Bygdaleiðir.

Men samstundis vita vit ikki, hvør fer at reka Bygdaleiðir eftir nýggjár. Heldur ikki vita vit, um hædd er tikin fyri møguligum eykaútreiðslum í teimum tilboðunum, sum komin eru í samband við privatisering av Bygdaleiðum, vísir Henrik Old á.

Eisini sigur hann, at tann bussførarin, sum hevur koyrt higartil, kendi fólkini bæði so og so. Hetta eru jú fólk, sum hava serligan tørv. Summi koyra langt og hava eitt nú brúk fyri at steðga á eina løtu og so framvegis. Alt tað dugdi førarin at samskipa. Men tað kann ein ikki krevja av einum bussførara, sum hevur sum endamál at koma sum skjótast millum tvey ásett pláss.

Tí metir Henrik Old ikki, at loysnin við Bygdaleiðum er nøkur góð loysn.

Alternativið til Bygdaleiðir er onnur loysn, sigur landstýrismaðurin í svarinum. Hvør hon er, verður ikki nærri útgreinað, men Henrik Old ivast ikki í, at hon eigur at verða vald. Tí hon er so líkatil og beint við hondina.

Hann fer at skjóta upp at fáa pengar aftur á fíggjarlógina til at reka bussin hjá verkstaðnum fyri aftur komandi ár. Bussurin er ikki seldur. Hann er tøkur og er í góðum standi, vísir Henrik Old á.



